# Sosialurin VARPIÐ

TV Televarpið

**TV3 Mánadagin kl. 21.00**

## Mr. Deeds

**Longfellow Deeds er ein fittur fýrur, sum livir eitt stuttligt lív. Hann býr í lítla Mandrake Falls í New Hampshire. Bygdarfólkið fylkist ofta á pizzarianum hjá Deed, har hann plagar at oysa burtur av sínum óvanliga skaldskapi. Sum so hevur hann tað fínt, men hetta broytist brádliga, tá hann einsamallur arvar heimsins størstsu miðlaimperium. Nú skal hann prógva, at hóast pengar broyta alt, so broyta teir ikki muruna í einum menniskja.**



Canal+(F)1 Sunnudagin kl. 19.00

### Warm Springs

39 ára gamalar verður Franklin D. Roosevelt raktur av polio. (F)ur greiðir frá søguni um sjúkuna, sum at enda gjørdi hann lamnan. Men hon kundi ikki forða honum í at gerast amerikanskur forseti. Ein forseti, sum í 1933 leiddi tjóðina gjøgnum eina av allar svárastu kreppunum yvir høvur.



DR2 Sunnudagin kl. 16.55

### Shia-Islam – og den skjulte imam

Tað finnast ein milliard muslimar í heiminum, og bert tíggju prosent av hesum eru shiamuslimar. Tað var ikki fyrr enn eftir kollveltingina í Iran í 1979, at hesin minnilutabólkurin trein fram. At byrja við beyð Vesturheimurin nýggja prestastýrinum góðan dag, men blíðu tónarnir broyttust skjótt, og síðani hevur shia-islam staðið sum ein varði fyri harðligara partin av islam-trúnni.



Canal+(F)1 Leygardagin kl. 19.00

### Matti: Hell Is for Heroes

Finski skíðleyparin Matti Nykänen fekk eitt lív, sum varð fult av drykkjuskapi, snýti, konubuking og knívstungum. Hetta samstundis sum hann legði skíðheimi fyri føtur sínar. Aleksi Mäkelä gevur her eina skiftandi, stuttliga og tragiska mynd av einum størstu OL-hetjunum hjá Finnlandi nakrantíð.

F R Í G G J A D A G U R 1 9 . J A N U A R 2 0 0 7

**(F)ir í hópatali • Barnasendingar • (D) • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**